**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

# Leiðari til eldraøkið

Tú hevur hugsanir um, hvussu eldraøkið kann mennast frameftir. Tær dámar avbjóðingar, og tú hevur evnini at leiða og motivera eitt ymisligt lið av leiðarum við ymisligum arbeiðsumstøðum.

Ljóðar hetta sum tú? So er eitt spennandi starv sum leiðari fyri eldraøkið leyst at søkja. Økið er í støðugum vøkstri, og tí krevst ein framsíggin persónur við góðum leiðaraevnum, ið setir framburð og trivnað í hásætið.

**Bygnaður og starv**
Deildin fyri eldraøkið er skipað undir Heimarøktini og Serforsorgini. Deildin fevnir í høvuðsheitum um heimarøktina og ellis- og røktarheimini. Virksemið er kring alt landið. Deildin umsitur fyri uml. 250 milliónir krónur árliga. Tað eru í løtuni uml. 845 starvsfólk innan økið, harav 455 starvast í Heimarøktini. Leiðarin arbeiðir í tøttum samstarvi við økis og stovnsleiðarar um alt landið.

Leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum í Heimarøktini og Serforsorgini.

Umframt deildina fyri eldraøkið eru fýra aðrar høvuðsdeildir undir Heimarøktini og Serforsorgini og tí gongur leiðarin inn í eitt kollektiv av leiðarum.

Arbeiðsplássið er dynamiskt og umsitur eina sera týðandi samfelagsskipan. Økið hevur stóran almennan áhuga, tí tað fevnir um tænastu til nógv fólk, og tað er ein avbjóðing at liva upp til krøvini við teimum fíggjarligu kørmum, sum politiska skipanin setir.

Talan er helst um størsta arbeiðsplássið innan fyri røkt í Føroyum, og tað økist, so hvørt fleiri uppgávur verða fluttar út í primeru tænastuna.

**Uppgávur og krøv**
Leiðarin hevur fíggjarligu, fyrisitingarligu og fakligu ábyrgdina á øllum økinum. Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, og eingin dagur er eins.

Starvið krevur, at tú hevur viðkomandi útbúgving og hollar leiðslu- og starvsroyndir. Persónliga krevst, at tú hevur breiðan rygg og ert týðiligur. Leiðarin má eisini hava hegni og evni at koma fram til framtíðarloysnir og fremja tær í verki. Tað krevur millum annað, at tú dugir at skapa sambond og varðveita tey. Tú skal vera savnandi og skapandi, tí einki verður framt uttan í samstarvi við onnur.

Starvið gevur tær ávirkan, tú kemur í samband við nógv fólk og hevur góðar møguleikar fyri eftirútbúgving.

Av tí at ætlanir eru um møguliga at leggja eldraøkið út til kommunurnar at umsita innan eitt ávíst áramál, mást tú tola, at tað kunnu koma broytingar í innihaldinum, ella at starvið verður umskipað til at fevna um aðrar uppgávur innanfyri stovnin.

**Løn- og setanartreytir**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvið er til flokkingar í løtuni. Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Eldraøkið.

Um fleiri upplýsingar ynskjast, ber til at ringja til Meginskrivstovuna á telefon 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra.

**Umsókn og freist**
Umsóknarfreistin er 20. januar 2006 kl. 12.00. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðkomandi skjølum skal sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Att: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
Postboks 3037 · FO-110 Tórshavn



# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN

## LEIÐSLUMENNING
**Útbúgving - 2006**

### Diplomleiðaraútbúgving — hold 5
**320 tímar, byrjar 3. apríl 2006 kl. 09.00-16.00**

**Hví brúka dýrabara tíð til hugsaðar støður og trupulleikar, tá tú ístaðin kanst brúka tín egna arbeiðsdag sum case?**
Á diplomleiðaraútbúgvingini fært tú ikki bert lærdóm inn í høvdið. Okkara grundregla er, at tú samstundis tekur støðu til nýggju vitanina og síðani brúkar hana á arbeiðsplássinum, har tú dagliga starvast sum leiðari. Við øðrum orðum: Diplomleiðarar sleppa í lestrartíðini at broyta teori til praksis.

Útbúgvingin verður roknað sum ein góð barlast hjá leiðarum serliga teimum, sum hava arbeitt við leiðslu, men enn ikki hava nomið sær eina útbúgving innan starvsfólkaleiðslu.
**Tilmelding: áðrenn 22. mars 2006**

### Grundleggjandi leiðaraútbúgving, vár — hold 7
**96 tímar 8; 9; 10. mai 8; 9; 22; 23. juni**
**30; 31. aug. 1. sept. - 2; 3. okt kl. 09.00-16.00**
Útbúgvingin vendir sær til nýggjar og komandi leiðarar. Vilt tú hava eitt størri leiðslufakligt støði, so er útbúgvingin nakað fyri teg. Royndir leiðarar, sum hava fingið nýggjar arbeiðs-og leiðslufunktiónir kunnu eisini taka hesa útbúgving.
**Tilmelding: áðrenn 24. apríl 2006**

### Grundleggjandi leiðaraútbúgving, heyst — hold 8
**96 tímar 13; 14; 15. nov. 4; 5. des. og í 2007: 11; 12. jan.**
**20; 21; 22. feb. 11; 12. mars kl. 09.00-16.00**
**Tilmelding: áðrenn 30. oktober 2006**

### Projektleiðaraútbúgving, vár — hold 6
**48 tímar 30; 31. jan. - 6; 7. mars - 20; 21. apríl kl. 09.00-16.00**
Arbeiðir tú við projektum, ella ert tú projektleiðari, so er útbúgvingin nakað fyri teg. Skift verður ímillum modul, sum vara 2 dagar og heimauppgávur, sum taka støði í tínum egnu projektum, og sum samantvinna teori og praktiskt arbeiði.
**Tilmelding: áðrenn 16. januar 2006**

### Projektleiðaraútbúgving, heyst — hold 7
**48 tímar 25; 26. sept. 23; 24. okt. - 20; 21. nov. kl. 09.00-16.00**
**Tilmelding: áðrenn 11. september 2006**

### Coaching — hold 3
**24 tímar 1; 2. mai - 12. juni kl. 09.00-16.00**
Seinastu árini er vorðið alt greiðari, hvussu umráðandi tað er, at leiðarin kennir coach-amboðini.
Við tí professionellu samrøðuni sum amboð lærir leiðarin at arbeiða tilvitað við menning av sínum starvsfólkum. Øll kunnu læra at gerast ein góður coach.
**Tilmelding: áðrenn 18. apríl 2006**

### Broytingarleiðsla — hold 1
**24 tímar 8; 9; 10. mai 14; 15. juni kl. 09.00-16.00**
Nýtt Leiðslumenning skeið í broytingarleiðslu í praksis!
**Ein útbúgving fyri leiðarar, sum arbeiða við broytingum, og sum hava eitt ynski um at skilja og handfara allar partar eisini teir truplu av leiðslu av broytingarprosessum.**

Dentur verður lagdur á bæði at geva innlit í strategiskar fyrimyndir til fremjing av broytingarprsessum, og at økja um sálarfrøðisliga innlitið í teimum aftanfyriliggjandi sálarfrøðiligu prosessum, sum ofta verða aktiveraðar í samband við broytingar.
**Tilmelding: áðrenn 20. apríl 2006**

**Lesið meira um skeiðini á *www.skeidsdepilin.fo* ella ringið 318813, tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.**

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo,
www.skeiðsdepilin.fo

TEAM85

# Til sølu

Hvítur Toyota Corolla 1.3i, árg. '98. Sýnaður í juni '05. Fekk ongan kross! Gott anlegg fylgir við.

**Tlf. 424600 ella 509159**

Lýsið
við
brúktum
bilum

